## Ikki umval í Iran

Tað máttmikla vaktarráðið í Iran hevur havnað kravinum frá andstøðuni um at halda forsetavalið umaftur, og tí hevur ráðið eisini havnað áheitanini frá andstøðuni um at ógilda valið, sum var tann 12. juni. Í grundgevingini ásannar ráðið, at ávís ógreið viðurskifti vóru í sambandi við valið, men at teey høvdu ikki avgerandi ávirkan á sjálvt úrslitið. Teir, sum taptu forsetavalið, hava latið myndugleikunum 646 kærur um valsvik og annað, og tvey av valevnunum høvdu kravt umval, og at valið tann 12. juni bleiv ógildað. Men tað verður av ongum, sigur vaktarráðið sambært almenna sjónvarpinum.



# Leirvíkingar skapa fleiri arbeiðspláss í supply-vinnuni

**Leygardagin kemur fyrsti supply-nýbygningurin hjá leirvíkingum á Havnina. Skipið er ov stórt til havnina í Leirvík, og tí verður skipað fyri almennari móttøku og navngeving í Havn, eins og døgurði verður fyri innbodnum seinni um dagin**

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leirvíkingar fara nú av álvara í supply-vinnuna, og gongst sum ætlað, kemur fyrsta supply-skipið, sum Supply Service hevur latið smíðað, á Havnina leygardagin.

Skrokkurin á hesum fyrsta skipinum av trimum er smíðaður í Turkalandi, og síðan er skipið gjørt liðugt í Noregi. Byggikostnaðurin liggur um 240 miljónir krónur. Næsti skrokkurin hjá leirvíkingum, ið ætlandi kemur sum nýbygningur seinni í heyst, er smíðaður í Portugál, og hin triði er aftur smíðaður í Turkalandi.

Tummas Justinussen, sum er høvuðsmaðurin aftan fyri hesa stóru supplyverkætlan hjá leirvíkingum, sigur, at í løtuni er ikki endaliga gjørt av, hvussu verður við triðja skipinum, og nær hetta ætlandi kemur, men hetta er nakað, sum teir í løtuni arbeiða við.

Hetta fyrsta skipið, sum kemur úr Noregi nú leygardagin, verður alment navngivið á Havnini, men longu nú hevur Eik Banki, sum saman við Realinum og Landsbaka Íslands fíggja hesa verkætlan, kunngjørt navnið, sum verður Eldborg.

### 22 arbeiðspláss

Tummas Justinussen sigur, at almenna móttøkan ætlandi byrjar klokkan 14, og seinni um dagin verður døgurði fyri innbodnum.

Orsøkin til, at Eldborg ikki kemur á Leirvík, er í stuttum, at skipið er ov stórt til tess. Longdin liggur um 80 metrar og breiddin um slakar 18 metrar.

Eldborg er eitt sera framkomið supply-skip, og kønir meta, at byggikostnaðurin – um sáttmálin varð undirskrivaður í dag – hevði verið væl størri, kanska einar 300 miljónir norskar krónur.

Tekningarnar til tey trý supply-skipini, sum ætlandi koma til Leirvíkar í komandi tíðum, eru at kalla tær somu, men næsta skipið í røðini er útgjørt øðrvísi og kostar soleiðis eisini nakar miljónir krónur meira enn hesin fyrsti nýbygningurin, helst einar 285 norskar miljónir tilsamans.





Tummas Justinussen sigur, at 11 mans verða umborð á Eldborg í senn, men tilsamans 22 mans verða knýttir at skipinum í tveimum vaktum. Øll manningin verður føroysk.

Skiparar eru Jan Kristoffersen og Einar Vang, báðir úr Havn.

### Tógvið stríð

- Hetta er eitt úrslit av átta ára longum arbeiði. Tað hevur ikki verið nøkur løtt uppgáva at fáa allar tær góðkenningar, sum skulu til fyri luttøku í hesum slagi av tænstu til oljuvinnuna, men vit hava havt óføra gott fólk aftrat okkum.

Norðmenn eiga sín lut í verkætlanini, men nógv tann størsti parturin er føroyskur. Feløgini, sum eiga hesi bæði skipini, verða burturav rikin í Føroyum, og tað verða skipini eisini.

- Vit samstarva við góð fólk, og millum hesi er Per Sævik, sum er ein hin kendasti offshore-maðurin í Noregi, og vit hava Tage Bundgaard, sum var stjóri í Mærsk Supply í eini 25 ár. Hesir royndu menn hava tænt okkum væl, og teir eru báðir í nevndini við pápa mínum, Osmundi Justinussen, sum nevndarformanni. Petur H. Jacobsen er um íløgufelagið Løkir, sum eigur part í verkætlanini, eisini í hesi nevnd felagsins.

Tummas Justinussen sigur, at nú hetta fyrsta skipið kemur heim til Føroya, eru teir sera spentir upp á hesa verkætlan, og felagið fegnast um at hava fingið ein fýra ára langan sáttmála um tænastuveitingar.